# Suzuki mest selda bilmerki




*Suzuki hava lagt seg á odda, sum mest selda bilmerki í Føroyum*

**Bæði í Føroyum og í Danmark eru Suzuki-bilarnir ein góð søluvøra. Her hjá okkum hava teir lagt seg á odda sum mest selda bilmerki. Nýggi Grand Vitara og Swift hava gjørt sítt til góðu søluna**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Við 304 seldum bilum hava Suzuki lagt seg á odda, sum mest seldi bilur í Føroyum í 2005, framman fyri Toyota (262), og Ford (147).

Tilsamans vóru seldir 1684 bilar í fjør. Berg Motors, sum selja Suzuki, seldu tilsamans 419 bilar, t.v.s. fjóðra hvønn bil.

Tað er ikki einans í Føroyum at Suzuki seta sølumet, eisini í Danmark eru teir millum teir fremstu, har vóru meira enn 18.000 Suzuki seldir í fjør, hetta er ein vøkstur upp á 40 prosent í mun til 2004 og ein trífalding í mun til 2003.

Suzuki hava seinnu árini verið mest seldu jeepar Danmark, og nýggi jeepurin Grand Vitara saman við persónbilinum Swift hava gjørt sítt til góðu søluna.

# Audi Le Mans Quattro verður til R8



*Rasarakonseptbilurin Audi Le Mans Quattro verður til Audi R8, tá hann kemur á marknaðin. Sum rasarabilur hevði hann 5.0 litur V10 motor við 610 hk*



*Í 2007 kemur hesin sportsligi Audi R8 á marknaðin við 4.2 litur motori við 420 hk. Leggið til merkis LED-diodu forlyktirnar*

**Audi hava nú almannakunngjørt, at rasarabilurin Le Mans Quattro, nú skal framleiðast á eini nýggjari verksmiðju í Neckarsulm í Týsklandi. Bilurin skal eita Audi R8, fær 420 hk og kemur á marknaðin í 2007**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Higartil hevur konseptbilurin Audi Le Mans Quattro, sum fyrstu ferð var alment sýndur fram fyri tveimum árum síðan, verið roknaður sum ein desideraður racarabilur. Men nú er avgerð tikin um, at bilurin skal framleiðast á eini nýggjari verksmiðju í Neckarsulm í Týsklandi undir navninum Audi R8. Audi hava gjørt eina íløgu upp á 28 milliónir evrur í hesa verksmiðju. Tað verður dótturfelagið hjá Audi, Quattro GmbH, sum fær ábyrgdina av framleiðsluni.

Bilurin verður ein tann fyrsti á marknaðinum við LED-forlyktum (diodulyktum).

Fyrimunirnir við hesum lyktum er, at umframt at tær lýsa sera væl, halda tær alla livitíðina hjá bilinum.

Bilurin verður permanent drivin av øllum fýra hjólunum, og motorurin verður ein 4.2 litur V8 við beinleiðis innspræning og 420 hk. Seinni kemur R8 helst eisini við V10 motori.

Audi R8, ið sær út sum ein rasarabilur, lágur og breiður við sera sportsligum designi, kemur á marknaðin í 2007.

Lesið Sosialin - so eru tit við

· Umvæling av tryggingarskaðum og privat skaðum
· Vit umvæla øll bilmerki
· Klárgering til sýn
· Bremsur, útstoyt, stoytdoyvarar, rustarbeiði o.m.a.



Ring og fá eitt tilboð

Sp/f Plátuverkstaðið
Falkavegur · Tórshavn · Tel 321778 ella 221778
Teldupostur: plv@plv.fo